


## Fólk til pakkhúsið í Tórshavn

Strandfaraskip Landsins lýsa við hesum eftir einum avgreiðslufólki til pakkhúsið í Tórshavn at seta í fast starv skjótast møguligt. Í pakkhúsinum verður arbeitt í vaktum, so tann sum settur verður, kemur at arbeiða aðruhvørja viku.

**Starvið fevnir um**
- Koyring
- Skipaavgreiðslu
- Kundaavgreiðslu
- Goymslu v.m.
- Viðlíkahald

**Førleikakrøv**
- Koyrikort til lastbil/trailara
- Trukkprógv
- Góðan røkjuskap
- Kundavinarligur

**Setanartreytir**
Løn- og setanartreytir verða eftir sáttmálanum hjá Havnar Arbeiðsmannafelag.

**Umsóknir**
Umsóknir við avriti av prógvum, ummælum, CV og tilvísingum skal sendast til:

Strandfaraskip Landsins
Boks 30
FO-810 Tvøroyri

og skal vera fyritøkuni í hendi í seinasta lagi 16. mai 2008 kl 12:00.

Ynskjast nærri upplýsingar, kanst tú venda tær til Jens Petur Brattalíð, ferðslusamskipara, á tlf. 543083, ella teldupost jpb@ssl.fo.

STRANDFARASKIP LANDSINS

Strandfaraskip Landins (SSL) eru landsfyritøka undir Løgmálaráðnum, hvørs endamál er at lúka landsins tørv á innanlands fólka- og farmaflutningi. Fyritøkan umsitur 29 farleiðir: 22 Bygdaleiðir og 7 Oyggjaleiðir. Samlaða talið av ferðafólkum við SSL í 2006 var 1,1 millión: 620 túsund við bussunum og 480 túsund við ferjunum. Talið av flutningsanleggum er 40 bussar, 8 ferjur og farmaflutningsútbúnaður. Starvsfólkini eru á leið 170 í tali, svarandi til 120 ársverk. Fyrisitingin á SSL er skipað í tríggjar deildir: Samferðslu-, Sjó-, og Fíggjardeild.

Lesið Sosialin -so eru tit við!



## *Lesivegleiðaraútbúgving*

**Ein liður í at uppstiga lesingina í fólkaskúlanum**

Hervið verður boðin út eftirútbúgving, ið hevur sum mál at skapa fyritreytir fyri betri lesing í fólkaskúlanum.

Endamálið er at geva lærarum førleika at virka sum vegleiðarar í lesing og skriving á øllum floksstigum í føroyska fólkaskúlanum.

Útbúgvingin verður á Føroya Læraraskúla og byrjar í august 2008. Undirvísingin fevnir um tvey skúlaár og telur 30 ECTS. Útbúgvingin skal vera liðug í seinasta lagi 1. juli 2010.

**Talan verður um 3 lestrareindir:**
- Innlit í lesing og skriving herundir um lesi- og skrivitrupulleikar
- Lesi- og skriviundirvísing
- Eftirmeting og vegleiðing

Hvør lestrareind endar við roynd, sum verður mett av uttanhýsis próvdómara.

Veittur verður tímaniðurskurður 4 t/v í tvey ár og annars aðrar sømdir sambært galdandi reglum hjá MMR.

Útbúgvingin verður skipað sum parttíðarlestur, lutvíst í samstarvi við útbúgvingarstovnar í útlondum. Vit vænta at umsøkjararnir hava læraraútbúgving og minst 2 ára starvsroyndir innan økið.

Lýsing av útbúgvingini er á heimasíðu Læraraskúlans: www.flsk.fo

Nærri fæst at vita hjá Karolinu Matras, lesigranskara á Læraraskúlanum, karolina@flsk.fo, tlf. 220627.

Umsóknir skulu – við viðmæli frá skúlaleiðsluni - sendast til Føroya Læraraskúla, Frælsið 20, FO-100 Tórshavn, og vera Læraraskúlanum í hendi í seinasta lagi hósdagin 8. mai 2008.

**Umsóknarblaðið er á heimasíðu skúlans www.flsk.fo**

FØROYA LÆRARASKÚLI